# Katy og Reidar Klein fingu viðhald

**Eftir drúgt stríð við myndugleikarnar um málið um teirra 9 ára gamla beinbrotna son, fingu Reidar og Katy Klein endiliga viðhald í teirri søk. Aftan á, at greinin hevði staðið í Sosialinum, bleiv málið tikið uppaftur og bleiv tað greitt, at hjúnini Klein kundu koma undir eina aðra lóg enn dagpeningalógina, sum so gav Katy rætt til pening, meðan hon var heima hjá Eriki**

ALMANNAMÁL
*Solby A. Eliasen*



*Málið um 9 ára gamla Erik Klein er nú avgreitt, og endaði tað við, at hjúnini Klein fingu viðhald, við tað at tey komu undir eina aðra lóg, sum gav Katy 100 % í endurgjaldi fyri mista inntøku, meðan hon var heima hjá soninum*

**Kambsdalur:** Reidar Klein sigur, at tá hann sá viðmerkingina hjá Almannastovuni í blaðnum dagin eftir, at greinin hevði verið í, ringdi hann til Almannastovuna og bað um eina frágreiðing.

- Tað var serliga orðingin í læknaváttanini, sum gjørdi sítt til, at støðan var, sum hon var. Á Almannastovuni tulkaðu tey orðingina: »tað er tí best at mamman er heima hjá dronginum« sum at Katy sjálv ynskti at vera heima, uttan at tað bleiv mett at vera alneyðugt. Og tað hongdi Almannastovan seg so í, meðan eg hongdi meg í, at tað stóð at drongurin MÁ hava hjálp, greiðir Reidar frá.

Hetta førdi so ein tvídrátt við sær millum Reidar og stjóran á Almannastovuni, sum tosaðu longi í telefon hendan dagin.

Eftir kjak aftur og fram millum tey bæði, har Reidar stóð við sítt, endaði tað so við, at stjórin á Almannastovuni segði, at um tey sendu øll skjølini aftur til Havnar, so skuldi hon lata málið upp aftur og viðgera tað av nýggjum.

Og tað gav úrslit.

Tað gjørdist greitt enn einaferð, at Katy leyk ikki treytirnar fyri at koma undir dagpeningalógina, men at hon haraftur ímóti kundi koma inn undir eina aðra lóg, sum gevur henni 100% aftur fyri mista inntøku, meðan hon var heima hjá beinbrotna soninum. Hetta tí, at drongurin var óhjálpin í so langa tíð.

Reidar leggur her aftur at, at tað vísti seg eisini, at Almannastovan av fyrstan tíð ikki hevði fingið teir røttu og neyðugu upplýsningarnar um málið, og tað gjørdi ivaleyst sítt til, at tað bleiv noktað teimum pengar av fyrstan tíð.

- Men tað er eisini uppgávan hjá Almannastovuni sjálvari at syrgja fyri, at tey hava teir røttu og neyðugu upplýsningarnar, soleiðis at eitt mál kann viðgerast á ein rættvísan hátt, sigur Reidar Klein av Kambsdali.

### Fílist á skipanina

- Vit fegnast sjálvandi um hetta, tí tað vísir, at tað loysir seg at hanga í, sigur Reidar, sum leggur eina við, at tað var ikki Almannastovan, sum var orsøkin til, at tað kom øði í tey av fyrsta sinni, men heldur orðingin í svarinum frá Kærustovninum, sum segði, »at tað ikki var mett at standa heilsuskaði av, at tygum eru burtur frá einum 8 – 9 ára gomlum seingjarliggjandi barni 5 – 6 tímar um dagin.«

Reidar og Katy halda, at tað er ov galið, at tey noyddust at fara í bløðini fyri at fáa tað, sum tey høvdu rætt til.

- Tað vísir bara, hvussu tað almenna virkar her í Føroyum. Tað er ov galið. Ein eigur ikki at vera noyddur at stríðast fyri slíkum, heldur Reidar, sum at enda sigur, at um tað ikki var fyri viðmerkingina hjá stjóranum á Almannastovuni til málið í Sosialinum, so hevði hann ikki havt ringt aftur til Almannastovuna, og so hevði málið ivaleyst hingið í leysari luft enn.

# Gull konto í tíggju ár

**Í samband við at tað nú eru liðin tíggju ár, síðani Norðoya Sparikassi kom við tí vælumtóktu ungdómskontoini Gull Konto eru munandi broytingar framdar á álmanakkan, sum Sparikassin letur ungdóminum á hvørjum ári**

GULL KONTO
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Gull álmanakkin hevur verið vælumtóktur millum ungu brúkararnar hjá Norðoya Sparikassa øll árini, síðani hann kom í 1992. Men tað hava ikki verið nógvar broytingar á honum gjøgnum árini. Inntil nú.

Bill Jacobsen, ungdómsráðgevi í Norðoya Sparikassa, sigur, at ætlanin hevur verið at dagføra álmanakkan seinastu tvey árini, men tað er so ikki blivið til tað.

- Tí hildu vit, at 10 ára haldið fyri Gull Kontoina var eitt gott høvi til at broyta hann, sigur Bill.

Og álmanakkin er broyttur nógv í mun til í fjør.

Bill sigur at, eftir ynski frá nógvum er, álmanakkin nú vorðin øðrvísi í sniði. Tann gamli var minni, og tað var ikki so nógv pláss at skriva á. Hann var heldur ikki í litum.

- Eisini er spiralur í nú, so hann kann liggja opin á einum borði framman fyri ein næming, og tað er nógv betur, heldur Bill.

Tað eru tey frá grafikaravirkinum Vasti í Klaksvík saman við fólkum frá Norðoya Sparikassa, sum hava staðið fyri arbeiðinum við at gera nýggja álmanakkan hjá Norðoya Sparikassa til tey ungu, sum hava Gull Konto.

Fyri at fáa Gull Konto krevst, at tú ert millum 13 og 26 ár.

### Kend andlit

Sera snøgga forsíðan á álmanakkanum má sigast at vera væleydnað. Tað er ein mynd av nøkrum ungum fólkum í eini ballón omanfyri Klaksvík í allarfagrasta summarveðri. Spurdur um, hvussu myndatøkan gekk fyri seg, sigur Bill við einum loyniligum smíli, at Per á Hædd hevur tikið myndina.

- Ja, hann var í tyrluni tann dagin beint oman fyri ballónina, sigur Bill og flennir, og sigur seg ikki vilja siga meira um myndatøkuna.

Annars stendur, at tað eru tíggju ár síðani Gull kontoin kom, á forsíðuni á álmanakkanum.

Bill vísir á, at tá álmanakkin kom fyri fyrstu ferð fyri tíggju árum síðani, tá vóru tað eisini ung fólk, sum myndaðu permuna á álmanakkanum. Millum tey vóru tá Todi Jónsson, Allan Mørkøre, Jákup Mikkelsen og Mildrið Jacobsen.

- Hesi eru øll komin sera langt í teirra lívi. Teir í fótbóltinum og Mildrið luttók einaferð í Miss Føroyar kapping, har hon endaði heilt frammarlaga í kappingini. So tað verður spennandi at síggja, hvar hesi ungu, sum vit hava valt hesuferð, verða um eini tíggju ár, heldur Bill.

### Vangamyndir

Um ein so hyggur álmanakkan í gjøgnum, so kann ikki annað sigast enn, at hann er sera fjølbroyttur við nógvum ymiskum til tey ungu.

Nógv av teim ungu nýta álmanakkan til eitt slag av Minn meg á bók, og tað er hann sera væl egnaður til eisini, tí hvør dagur hevur einar fimtan reglur til at skriva á. Á hvørjari síðu standa eisini ymiskir upplýsningar ella ymiskt annað, sum hevur áhuga millum ung. Til dømis standa onkur orðatøk, onkrar skemtisøgur og so eisini, hvat ein skal gera fyri at forbrenna mat, sum ein hevur etið.

Haraftur at eru stjørnutekini eisini við. Her hava tey valt at taka ymiskar kendar persónar kring landið og gjørt eina vangamynd av teimum saman við teirra egna stjørnutekini. Millum tey, sum eru við kunnu nevnast Eivør Pálsdóttir, Jákup Mikkelsen, Brandur Enni og Kristina Eyðbjørnsdóttir.

Bill sigur, at hetta varð gjørt fyri at fáa kalendaran meiri fjølbroyttan og áhugaverdan fyri tey ungu.

- Allir hesir persónarnir standa frammi í føroyska umhvørvinum og øll kenna vit tey, so tað var so upplagt at gera eina vangamynd av teimum og á tann hátt fáa tey við í kalendaran.

### Silvi og so Gull

Bill Jacobsen sigur, at tað eru sera nógv ung, sum nýta Gull Kontoina. Og hann væntar, at tað fer at halda fram. Fyri ikki so langari tíð síðani, kom Sparikassin við Silva og er ætlanin at børnini, sum hava havt Silva skula fara beinleiðis til Gull Konto, tá tey eru fylt 13 ár.

- Vit eru sera vælnøgd við gongdina sum heild. Og fólk hava eisini tikið sera væl ímóti Silva, so nú skal hann bara koyra í eina tíð, meðan Gull Kontoin treingir til eina vakurleikaviðgerð, sigur Bill uttan at vilja koma nærri inn á, hvat ungu brúkararnir hjá Norðoya Sparikassa kunnu vænta sær í framtíðini.

- Men tað verður okkurt spennandi, tað er heilt vist, sigur Bill avgjørdur.

Tað er sum sagt Per á Hædd, sum hevur tikið myndirnar í álmanakkanum, meðan Vasti (grafiskt design) hevur tikið sær av sniðgevingini á tí nýggja álmanakkanum hjá Norðoya Sparikassa, sum fæst við at venda sær til avgreiðsluna.




*Nýggi álmanakkin hjá Norðoya Sparikassa er nú komin, og hann er munandi broyttur í útsjónd samanborið við undanfarin ár*



UTTAN ÚR HEIMI

# Soham syrgir

**Í enska býnum Soham er sorg, eftir at tað varð staðfest sunnudagin, at tær báðar horvnu tíggju ára gomlu genturnar Jessica Chapman og Holly Wells vóru deyðar**

BRETLAND
*Árni Joensen:*

Holly Wells og Jessica Chapman, sum hvurvu næstseinasta sunnudag, vórðu leygardagin funnar myrdar 15 kilometrar rrá heimbýnum Soham. Aftan fyri rimarnar á løgreglustøðini í býnum sita ein 28 ára gamal maður og 25 ára gamla vinkona hansara skuldsett fyri at hava beint fyri gentunum.

Hóast tveir menn komu fram á líkini av gentunum leygardagin, vildi løgreglan ikki vátta, at tað vóru Jessica Chapman og Holly Wells, sum menninir høvdu funnið, men sunnudagin varð váttað, at so var. Løgreglan hevur framvegis ikki upplýst, hvat gentunum hevði verið fyri, men sambært fjølmiðlunum var tað ein sera óhugnalig sjón, sum møtti teimum báðum monnunum, sum funnu líkini.

Sunnudagin vóru næstan 500 fólk til guðstænastu í St. Andrews kirkjuni í Soham. Nógv børn bóru blómur og myndir av teimum báðum gentunum, og tað sást á bæði ungum og tilkomnum, at sorgin nívdi býin.



*Tær báðar tíggju ára gomlu vinkonurnar Jessica Chapman og Holly Wells vórðu leygardagin funnar myrdar eftir at hava verið horvnar í fjúrtan dagar*

Presturin Tim Alban Jones, sum segði prædikuna sunnudagin vera ta truplastu, sum hann nakrantíð hevði skrivað, segði, at tað, sum er hent í Soham, er eitt prógv um, hvussu djúpt mannahjartað kann søkka.

# Amerikanska krígshóttanim er eitt mistak

**Amerikanska hóttanin um at leypa á Irak ger tað bara truplari hjá ST at fáa sínar vápnaeftirlitsmenn aftur til landið, sigur leiðarin hjá eftirlitsmonnunum**

USA-IRAK
*Árni Joensen:*

– Koma irakar til ta niðurstøðu, at tað slepst ikki undan einum amerikanskum álopi, kunnu teir eisini koma til ta niðustøðu, at tað tænir ongum endamáli at geva vápnaeftirlitsmonnunum hjá ST atgongd til landið aftur.

Tað sigur svenski formaðurin hjá eftirlitsmonnunum, Hans Blix.

George W. Bush, forseti hevur ferð eftir ferð endurtikið, at tað er neyðugt at fáa Saddam Hussein frá, og at USA er til reiðar at gera tað við vápnamegi. Í síðstu viku segði trygdarráðgevi forsetans, Condoleezza Rice, at tað slepst ikki undan at leypa á Irak fyri at fáa tann ónda mannin burtur, sum hon málbar seg.

Nú ávarar Hans Blix ímóti álopshóttanunum. Í einari samrøðu við BBC sunnudagin ásannaði hann, at tað seinasta uppskotið frá Irak um at taka eftirlitið uppaftur var ikki nóg gott, men hann helt, at tað eigur at bera til at ávirka iraksku stjórnina til at geva eftirlitsmonnunum atgongd til landið, so teir kunnu kanna, um landið hevur ella er í ferð við at gera hópoyðingarvápn.

– Eg haldi tað vera týdningarmikið, at eftirlitsmenninir sleppa aftur til Irak, og at teir sleppa at fullføra sína uppgávu. Vit eru allir tilreiðar at gera okkara fyri at sleppa undan einum kríggi, segði Hans Blix.

Fríggjadagin boðaði stjórnin í Bagdad frá, at hon er til reiðar at tosa við ST um møguleikan at lata vápnaeftirlitsmenninar koma aftur til landið. Enn hevur ST ikki svarað hesum seinna tilboðnum.

## Vatnið norðureftir

Tað nógva vatnið í ánni Elben rennur nú norðureftir ígjøgnum Týskland. Í gjár kom vatnflóðin til landspartin Sachsen-Anhalt, og nógvastaðni fór vatnið upp um byrgingarnar og legði partar av fleiri býum undir. Avgjørt varð at flyta 40.000 fólk úr býnum Wittenberg.

Samstundis kunngjørdu týsku myndugleikarnir, at 16 týskarar eru deyðir í vatnflóðini seinastu vikuna, men framvegis eru 12 fólk ikki komin afturíaftur.

Oyðileggingarnar av vatnflóðini í Miðevropa eru sera stórar, og fleiri lond hava játtað pengar til endurreisingararbeiðið. Minst 90 fólk eru deyð, og bara í Týsklandi hevur vatnflóðin ávirkað gerandisdagin hjá 4,2 milliónum fólkum, og meiri enn 100.000 eru rýmd heiman.

## Funnið bandasavn

Amerikanska sjónvarpið CNN vil vera við, at tað hevur fingið fatur á einum sjónbandasavni, sum yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda nýtti til at útbúgva yvirgangsmenn.

Sambært CNN fekk ein av tíðindamonnunum bondini frá nøkrum afghanum, sum hava hjálpt CNN við tíðindum úr Afghanistan. Bondini eru 64 í tali, og sagt verður, at sjálvur Osama bin Laden hevur átt tey, og at hann er á fleiri av upptøkunum.

Sambært CNN vísir eitt av bondunum nakrar menn eitra tveir hundar við einum ella øðrum hvítum evni. Hetta hevur fingið amerikanskar serfrøðingar at siga, at al-Qaeda helst er komið longur við kemiskum vápnum, enn higartil hevur verið hildið.

## Ótti fyri umhvørvinum

Vatnflóðin í eystara parti av Týsklandi hevur gjørt fólk ótrygg, og mong bera nú ótta fyri einari umhvørvis- og dálkingarvanlukku.

Orsøkin er tær nógvu kemisku verksmiðjurnar á hesum leiðunum. Leiðslurnar á verksmiðjunum hava vissað fólk um, at trygdin er í lagi, men fólk ivast. Trupulleikin er, at nógvar av verksmiðjunum eru bert fáar kilometrar frá áunum, og harafturat er lendið slætt, og tí skal ikki nógv til, áðrenn alt stendur undir í vatni.

Ein annar trupulleiki er, at eingin veit við vissu, hvat liggur niðri í jørðini, tí tað er ikki óhugsandi, at burturkast frá DDR-tíðini liggur niðurgrivið ymsastaðni á hesum somu leiðunum.

## 1.900 naknir finnar

Næstan 2.000 naknir finnar fyltu sunnumorgunin Salutorgið í miðbýnum í Helsingfors.

Orsøkin var, at ein amerikanskur myndamaður, Spencer Tunick, vildi fegin hava myndir av naknum finnum, og hann hevði tí biðið tey áhugaðu koma á torgið sunnumorgunin.

Ikki færri enn 2.500 kvinnur og menn boðaðu frá, at tey vóru til reiðar at lata seg avmynda, men 600 broyttu áskoðan seinni. 1.900 møttu kortini, so Spencer Tunick fekk sínar myndir. Frammanundan hevur hann tikið myndir av naknum fólki í fleiri øðrum londum, og allastaðni hava fólk í hópatali verið til reiðar at lata seg avmynda nakin.